

## Tey gomlu spæla Wii

Nintendi Wii verður helst fast inventar á donskum røktarheimum í framtíðini. Fleiri røktarheim í Danmark hava góðar royndir av at geva teimum gomlu tilboðið at spæla Nintendo Wii. At spæla tennis ella at bovla stimbrar vøddar og sál. Og so hava tey tað eisini stuttligt saman. Sum fyrsta sjúkrahús í Danmark bjóðar sjúkrahúsið í Kolding nú innløgdum sjúklingum at spæla Nintendo Wii.

## Listakvinnur í Smiðjuni

Hósdagin letur upp framsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Annika A. Gregoriussen, Kari Roarsdóttir og Durita Flóvinsdóttir sýna fram verk komandi dagarnar. Verkini, sum vera við á framsýningini, eru sera ymisk. Listaframsýningin letur upp hósdagin kl. 17, og tá spæla Leivur Thomsen og Kolbein Simonsen. Framsýningin er opin fram til týsdagin.



# AV LANDI ÚT Á HAV

**PAM OFFSHORE** Virksemið í Noregi, sum Pam Offshore hevur verið partur av, er minkað, og nú leitar dóttirfelagið hjá MEST eftir møguleikum at sleppa út á boripallar at arbeiða, nú fleiri av hesum skulu uppgraderast

*- Í løtuni hava vit einki til teir menn, sum hava arbeitt fyri okkum í Noregi, og enn hava vit onga vissu fyri, nær nýggir sáttmálar eru undir landi, sigur Frithleif Olsen, stjóri í MEST*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Vilmund Jacobsen**

Frithleif Olsen, stjóri í MEST, sum eigur og rekur Pam Offshore, váttar, at dóttirfelagið í løtuni ongan sáttmála hevur í Noregi og tískil heldur ikki hevur nakað fólk har yviri. Hann sigur, at felagið alla tíðina liggur framvið at gerast partur í avtalum um virksemi av slíkum slagi, sum felagið hevur verið við í gjøgnum hesi mongu ár, men ásannar, at í løtuni eru møguleikarnir á landi avmarkaðir.

– Í flestu førum hava vit verið við sum partur av stóru Aker-fyritøkuni í Noregi og hava soleiðis verið undirveitarar hjá felagnum í ymiskum verkætlanum, sigur hann.

### Út á hav

Stjórin vísir á, at nú virksemið á landi, sum Pam Offshore hevur verið partur av, er minkað og ikki er meiri enn til tey fólk, sum høvuðsfelagið hevur, er dóttirfelagið hjá MEST farið at fyrireika seg til at fara í offshore vinnuna at leita eftir møguleikum.

Eins og elektrikarin, sum Sosialurin hevur tosað við, sigur, standa fleiri boripallar fyri stórum yvirhálingum.

– Vit fara tí at senda nakrar av teimum monnum, sum

> **Vit síggja møguleikar í at gerast undirveitarar, nú boripallar skulu uppgraderast. Skulu vit koma upp á tal, mugu vit gera okkum til reiðar**

hava arbeitt hjá okkum, til Noregs á grundskeið í komandi viku. Hetta skeiðið er minsta krav, ið sett verður til arbeiðsfólk, sum fara út á boripallar at arbeiða.

Frithleif Olsen sigur, at í fyrsta lagi fara einir 20 mans til Noregs.

– Vit høvdu sjálvandi ynskt, at talið var enn størri, men við ongum sáttmála í løtuni kunnu vit ikki bjóða øllum, sum hava arbeitt hjá okkum, á skeið.

Stjórin í MEST sigur seg vóna, at Pam Offshore í næstum kann vísa á, at felagið hevur okkurt at bjóða monnum, sum hava arbeitt fyri felagið og sum framvegis ynskja at arbeiða fyri felagið.

– Men í løtuni hava vit einki til teir menn, sum hava arbeitt fyri okkum í Noregi, og enn hava vit onga vissu fyri, nær nýggir sáttmálar eru undir landi, sigur Frithleif Olsen, stjóri í MEST.

### Møguleikar

Dagligi leiðarin á Pam Offshore, Anja Jacobsen, sigur, at skeiðið, sum hesir umleið 20 menninir nú fara á í Stavanger, er at meta sum eitt »koyrikort«, sum er minsta krav hjá teimum fyri at sleppa út á boripallar at arbeiða.

– Vit síggja møguleikar í at gerast undirveitarar, nú fleiri boripallar skulu uppgraderast. Skulu okkara fólk koma upp á tal sum partur at hesum virksemi, mugu vit gera okkum til reiðar, og tí senda vit nú hesar menn á skeið, sigur Anja Jacobsen, sum annars vísir á, at Pam Offshore hevur samband við fleiri feløg um at gerast undirveitarar innan el og ymiskt smiðjuarbeiði, sum eitt nú rør- og sveising.

vilmund@sosoialurin.fo